# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Føroyingur í enskari gittarkapping

Guitar Idol 2008 eitur kappingin, ið ungi føroyski gittarleikarin Pauli Reinert Poulsen luttekur í. Høvuðsvinningurin er at hita upp fyri guðfaðirin at instrumentalum gittar tónleiki, Joe Satriani. Undanumfarið fer fram á alnótini, har gittaristar leggja sín sang út á heimasíðu. Síðani skulu dómarar og luttakarar døma um, hvørjir 12 gittaristar fara víðari til finaluna.

Finalan fer fram 14. juni á næststørstu tónleikamessuni í Evropa, London International Music Live, tá teir 12 finalistarnir skulu spæla fyri stórum áskoðaraskara, har nógvir heimskendir gittaristar vera tilstaðar – m.a. Paul Gilbert og Yngwie Malmsteen. Lyklafólk innan vinnuna fara at døma finaluna, og vinnarin sleppur at hita upp fyri Joe Satriani, tá hann framførir seinni á hesi tónleikamessuni, umframt at vinnarin fær tónleikaútgerð sum vinning.

Tílíkar kappingar vóru heilt vanligar fyrr, men seinastu árini hevur ikki verið tann stóri áhugin fyri gittarsnillinga-tónleiki. Tó er komið vend í rákið, og mettu fyriskipararnir, at tíðin er aftur búgvin, til at seta gittarsolo'ina í fokus.

Pauli er 22 ár og hevur fyri tað mesta búð í Føroyum. Í ár lesur hann á kristiliga tónleikaskúlanum Nexus, í Coventry, Onglandi. Hann spælir m.a. við í bólkinum Proclaim, sum gav fløgu út í fjør. Eisini spælir hann við Martin í Grund, og hava teir rættiliga gjørt vart við seg í Onglandi, við m.a. at vinna Battle of the Bands.

Til ber at atkvøða á síðuni: www.guitar-idol.co.uk. Til tess at kunna atkvøða má ein skráseta seg á síðuni. Profilurin hjá Paula er at finna á www.guitar-idol.

# Fyrsti heiðurslimur Eysturoyar Tjóðveldisfelags

**Fríggjadagin 16. mai varð 90 ára gamli Petur Højgaard í Saltangará kosin fyrsti heiðurslimur Eysturoyar Tjóðveldisfelags.**



*Petur Højgaard varð tilnevndur fyrsti heilðurslimur Eysturoyar Tjóðveldisfelags á 90 ára føðingardegi sínum fríggjadagin 16. mai*

Eysturoyar Tjóðveldisfelag skal við hesum skjali boða frá, at Petur Højgaard, navigatørur, Saltangará, er tilnevndur fyrsti heiðurslimur felagsins.

Uttantings hava tygum í seksti ára søgu floksins verið ein av alra fremstu oddvitunum. Áhaldandi. Ein teirra sum ongantíð boygnaði, heldur ikki tá ið tað stóð á hvørjum nagla. Felagið og flokkurin var amboðið, sum skuldi nýtast at fremja hjartamálið um politisku framtíðarstøðu landsins.

Framburðssøgan hjá føroyingum og okkara tjóðskaparstríð eru tvær alin av sama vaðmali. Í tínum og okkara føri endar hetta stríðið ikki fyrrenn tjóðin er skipað sum ein sjálvstøðugur statur í alheims samfelagnum. Tað er Republikkin Føroyar.

Blíðan byr og hjartaliga tillukku við hesum mikla heiðuri.

**Strondum, 16. mai 2008**
**Jónsvein Bjartason, formaður**

**Dagurin**
**20. mai. Angelica.** Teir kenna onga halga konu við hesum navni

# Fleiri nýggj føroysk frímerki




Postverk Føroya gevur mánadagin 19. mai út fleiri nýggj frímerki:

Evnini eru hesi: Norrøn fólkatrúgv - íbygd støð, brævaskriving og

Mýrisólja – tjóðarblóma føroyinga. Eitt smáark við seks frímerkjum verður eisini givið út. Merkini avmynda seks føroysk mentafólk, sum vóru undangongufólk hvør á sínum øki: Niels Christopher Winther (1822 – 1892), Súsanna Helena Patursson (1864 – 1916), Rasmus Christoffer Effersøe (1857 – 1916), Jógvan Poulsen (1854 – 1941), Fríðrikur Petersen (1853 – 1917), og Andreas Christian Evensen (1874 – 1917).




## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Olga Jensen**
av Sandi

andaðist og fór til gravar.
Takk til tykkum, sum vóru um hana ta síðstu tíðina.
Takk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Takk fyri blómur og kransar.
Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vinarliga*
**Poul Edvard, Ebban,**
**Olga, Símun og Jens Martin**